## Dansinátt í Øravík

Leygarkvøldið 5. september verður vælumtókta dansináttin aftur á Hotel Øravík. Tað eru dansifeløgini í Suðuroy, sum skipa fyri og hetta er eitt tiltak, sum hevur verið afturvendandi nú í nógv ár. Dansináttin hevur verið ógvuliga væl umtókt og nógv fólk eru komin saman hetta kvøldið at dansa føroyskan dans. Tað hevur eisini verið vanligt, at nógv fólk norðaneftir eru komin suður hetta kvøldið at dansa. Tiltakið byrjar klokkan 19.30 við góðum borðhaldi og aftan á verður farið upp á gólv tað mesta av náttini. Tilmeldingin er hjá dansifeløgunum í Suðuroynni.



## Nýggi forstjórin á TAKS settur

Fíggjarmálaráðið hevur í dag sett Eyðun Mørkøre sum forstjóra á TAKS. Eyðun Mørkøre hevur bankaútbúgving og aðra akademiska útbúgving innan bankayrki. Hann hevur verið stjóri á TAKS á Hálsi í eitt ár, og hevur verið settur stjóri á TAKS í tveir mánaðir. Eyðun Mørkøre er 38 ára gamal og hevur drúgvar royndir frá Eik Banka, har hann hevur verið leiðari í 9 ár. Eyðun Mørkøre byrjar í starvinum 1. september 2009.

# Næraberg fer í morgin

**Næraberg, sum hevur fingið Pacific Voyager, fer í Stillahavið at fiska**

FISKIVINNA
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað hevur leingi ljóðað, at P/F Næraberg hevur tingast um at selja Næraberg, og í dag váttar reiðarin Hanus Hansen, at Næraberg er seldur. Hann varð strikaður í føroysku skipaskrásetingini hósdagin.

Keyparin er eitt reiðarí í Peru við eigarum úr Hong Kong. Hetta er sama felag, sum í juni keypti Trónd í Gøtu.

Næraberg hevur longu skift navn og eitur nú Pacific Voyager. Áðrenn hann kom til Føroya, æt hann Voyager.

Skipið skal í Stillahavið at fiska eins og fyrrverandi Tróndur í Gøtu.

Hann fer avstað longu í morgin.

### Leita eftir øðrum skipi

Hanus Hansen sigur, at roynt verður at finna annað skip fyri Næraberg. Hann vldi helst, at funnin var ein størri loysn, men enn torir hann ikki at siga, hvat taåð fer at enda við.

Teir umleið 20 menninir, sum knýttir vóru at Nærabergi, eru ikki uppsagdir. Flestu teirra hava valt at bíða eftir avloysaraskipinum.

Næraberg hevur staðið á skipasmiðjuni í Havn nú í fleiri vikur. Hann hevur ikki kunnað fiskað seinastu tríggjar mánaðirnar, men nú eru tey viðurskiftini komin í rættlag, so avloysaraskipið sleppur beinanvegin til fiskiskap. Teir kunnu svartkjaft, makrel og annan ídnaðarfisk.



*Næraberg, sum í fleiri vikur hevur staðið á skipasmiðjuni í Havn, er farin úr flotanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fútin rindar útreiðslurnar

**Russiski trolarin Ros hevur nú ligið í fimtan mánaðir í Kollafirði, og einki røkist fyri, at hann verður seldur. – Hetta er ein stórur sorgarleikur, sigur varafútin Finn Ougaard. Alla hesa tíðina hevur fútaembætið goldið streym og havnagjald, tí politiið legði hald á skipið. Góð fólk bera monnunum mat**

RANDI JACOBSEN
*randi@sosialurin.fo*

Russiki trolarin Ros er vi at gerast ein føst bygdarmynd í Kollafirði. Hann hevur ligið har við bryggju síðan mai í fjør, og enn er einki, ið bendir á, at hann loysir í bræði.

Av tí at politiið í fjør legði hald á skipið, noyðist Føroya landfúti at gjalda føstu útreislurnar hjá skipinum, meðan tað liggur við bryggju, streym, vatn og havnargjald.

Ætlanin er at fáa selt skipið fyri at fáa tað burtur úr Kollafirði, men tað er ikki sum at siga tað at selja ein gamlan russiskan trolara.

### Kanna møguligt pant

Finn Ougaard, varafúti sigur, at tey eru við at kanna ymisk viðurkifti, áðrenn tað ber til at bjóða skipið út til sølu. Eitt nú má vissa fáast fyri, at einki pant er í skipinum.

Skipið varð lagt, eftir at tað í fjør varð tikið fyri ólógligan fiskiskap í føroyskum sjógvi. Síðan er reiðaríð farið á heysin, og umboðsstovan Faroe Agency fær ikki strekt seg longur, tí reiðaríið skyldar teimum frammanundan so nógv og hevur ongastaðni at senda rokningarnar fyri skipið til..

Árni Dam, stjóri í Faroe Sagency viðmerkir tó, at teir eru millum teirra, sum geva monnunum mat.

- Svølta skulu teir í hvussu er ikki her, sigur Árni Dam.

Umborð eru framvegis tríggir av manningini og halda vakt. Teir vilja ikki fara heim, tí teir eiga so nógva hýru á.

Felagsskapurin Hjálpin hevur eisini fleiri ferðir verið umborð á Ros við mati.

- Hetta er ein stórur sorgarleikur, men vit mugu hava alt tað løgfrøðiliga á plass fyrst av øllum, sigur Finn Ougaard.

Hann veit at siga, at heilt nógvir russisskir trolarar liggja í Noregi og eru í somu støðu sum Ros. Reiðariini eru farin av knóranum, og eingin hevur ábyrgdina av skipunum. Fyritøkur missa stórar upphæddir, og manningarnar liva av náði og gávum frá góðum fólki.

